Dimmalætting

– ÁLÍTANDI TÍÐINDI

Týsdagur
Nr. 95 • 120. árgangur
27. mai 1997
Tlf. 11212 • Fax 10941
kr. 7,00

ÍF-málverjin hevði úr at gera

Málmaðurin hjá ÍF noyddist átta ferðir inn í málið eftir bóltinum, tá fuglfriðingar vitjaðu B36 sunnudagin. B36 vann 8-3 og er framvegis á odda í 1. deild við fullum stigatali. VB hevur eisini vunnið allar sínar dystir.

Ítróttur

Tony Blair í parti við Norðurlondum

Danmark og Svøriki vóna, at nyggi bretski forsætismálaráðharrin Tony Blair er í teirra parti í viðkvæmum ES-spurningum. Tony Blair var annars fríggjadagin á sínum fyrsta ES-fundi, og slapp hann sera væl frá fundinum.

Uttanlandstíðindi 8

Latið Sersjanthúsini fáa frið

Jóhannes av Skarði ger viðmerkingar til ætlanina at flyta Sersjanthúsini út á Reyn. Jóhannes av Skarði harmast um ætlanina og vísir á, at tað er skeivt at skilja húsini og víkina við sama navni hvørt frá øðrum.

Orðaskifti 9

Fleyr av ymsum ættum. Sólglottar. Hitin millum 5 og 10 stig.

AFS-næmingur við trolara

Meðan Mahmooda Syed hevur verið her sum AFS-næmingur, hevur hon verið á Stóru Dímun, givið løgmanni eina páskalilju og skotið eina haru. Men tað, henni dámdi best, var at vera ein tur við trolara.

Heimatíðindi, síða 4

Feilíløga hjá Framtaksgrunninum bjargað við vaktartænastu

Framtaksgrunnurin hevur orð fyri at seta harðar treytir, fyri at tryggja sær, at ein iløga kem aftur. Men ein av teimum heilt fáu iløgunum, burtursæð frá Fiskasøluni og Fiskavirking, mátti bjarga sær við at tæna sum vaktarskip.

GEORG L. PETERSEN

Gamli Hans Erik, sum í sambandi við ognarskifti í 1995 broytti navn til Nim, skuldi við hjálp frá Framtaksgrunninum fara á krabba- og havtaskaveiði. Men longu frá byrjan gekk galið hjá nýggja felagnum P/f Deep Sea Ltd, har Framtaksgrunnurin setti góða millión krónur í. Hetta svarar til 47,4 prosent av partapeningini.

Afturfyri hevur Framtaksgrunnurin so eisini fingið ein nevndarlim fyri at fylgja við, um ilegan verður fyrisitin sum hon skal.

– Vit komu nakað illa frá byrjan við krabbanum, sigur Gudmund Mortensen, reiðari á Nim.

So har var einki annað at gera, enn at royna aðrar leiðir, fyri at halda virksemínum koyrandi. Og bert stutt eftir, at Framtaksgrunnurin fór inn við kapitali, ið skuldi stuðla undir eina alternativa vinnu, endaði Nim sum vaktarskip í Norðsjónum í tveir mánaðir.

Og nakað seinni hevur felagið so bjóðað skipið fram til vaktarskip, inntil antin Nólsoyar Páll kemur í sigling ella nytt skip verður keypt. Har er einki komið burturúr og Nim skal nú til Noregs enn einaferð sum vaktarskip. Gudmund Mortensen, reiðari, sigur at hóast skipið verður brúkt til vaktarskip, so merkir tað ikki, at krabbin og havtaskan eru slept.

Niels Dan Vest, stjóri í Framtaksgrunninum, sær einki galið í, at eitt skip leggur um fyri at klara sínar skyldur. At tað upprunaliga virksemið, sum Framtaksgrunnurin stuðlaði undir við eini iløgu upp á 1 million krónur, ikki hevur borið til, sær hann ikki sum nakran trupulleika. Hann sigur seg heldur ikki sigga nakra meining í at kunngera, hvussu gongst við møguliga broyttum ætlanum.

– Tað ræður bara um at fáa tað at bera til. Vit hava gjørt eina iløgu, sum vit vilja hava aftur við avlopi, sigur stjórin í Framtaksgrunninum.

Heystfrítíðin karmur um jazzfestivalin

Sum eina roynd verður árligi »Jazz-, Fólka- og Bluesfestivalurin 1997« fluttur úr august mánaði og tveir mánaðir longur út á árið.

BEATE L. JENSEN

Fyri fyrstu ferð, síðani farið varð undir árliga tiltakið við »Jazz-, Fólka- og Bluesfestivalinum«, verður tað hildið í Norðurlandahusinum í oktober mánaði í ár – og ikki í august, sum tað øll árini frammanundan hevur verið siður.

Hetta kemst av, at tiltakið ikki hevur verið so nógv vitjað seinastu árini, sum av alra fyrstan tíð. Helst kemst hetta so aftur av, at fólk ikki hava so nógvan pening um hendi, tá komið er út í august mánað, tí tey hava brukt tað mesta av tí, tey høvdu spart upp, til at halda summarfrí fyri, heldur stjórin í Norðurlandahusinum, Peter Turtschaninoff.

Eisini liggur betri fyri at fáa kend nøvn henda vegin um heystí enn í august, tí um heystið koma nógv teirra til Danmarkmar og tá eru tey biligari at fáa kendar »stjørnur« til Føroyar. Summarsesongin er av og lættari er at fáa gestunum innivist.

»Jazz, Fólka- og Bluesfestivalurin 1997« kemur at at fara fram í heystfrítíðini hesa ferð.

Um hetta eisini kemur at vera so í framtíðini, er óvist. Tað veldst alt um, hvussu komandi »Jazz-, Fólka- og Bluesfestivalurin« fer at eydnast.

Nógv fyrireiking

Metingar vísa, at bert fimm prosent av teimum vitjandi á festivalununum, sum verið hava seinastu árini, hava verið summargestir, meðan restin hava verið føroyingar, sum bugva her.

Tað er Brandur Óssursson, tónleikari og fyriskipari, sum av fyrstan tíð av sínum eintingum og einsamallur tók stig til jazzfestivalin, sum líka síðani hevur verið hildin í Norðurlandahúsinum.

Seinnu árini hevur Brandur fingið onnur tónlistaáhugað at hjálpa sær við tiltakinum, sum krevur nógv og stórt fyrireikingararbeiði, ikki minst við at fáa kend tónlistafólk hendavegin, sum vónandi ikki krevja alt ov nógvan pening fyri at vera við á festivalinum, men eisini taka tiltakið sum eitt stórt upplivilsi bara við at fáa høvi at koma til Føroyar, sum tey lítið og einki kenna til frammanundan.

Mynd: Jan Müller

Richard Hardmann, Amerada Hess – í miðjuni – saman við Ólavi Hátun, Musikkskúlin, og Bjarna Sørensen úr Róðrasambandi Føroya

Amerada Hess stuðlar tónleiki og kappróðri

Ólavur Hátun, leiðari á Musikkskulanum og Bjarni Sørensen fyri Róðrasambandið, kundu sanniliga smilast mánadagin. Frá heilt óvæntaðari síðu fingu teir stuðul til sítt virksemi.

GEORG L. PETERSEN

40.000 krónur til Musikkskúlan og eitt stásiligt steyp til 10-mannaførini vórðu í gjár handað av Richard Hardmann á samkomu á Hafnia. Oljufelagið hevur lagt seg eftir at stuðla list og ítrótti – og í Føroyum var kappróðurin tikin framum, tí sjógvurin myndar føroyska samfelagið.

Tær 40.000 krónur til Musikkskúlan komu sambært Ólavi Hátun á eitt turt stað, og skulu brúkast til at menna um sonevndu suzuki-frálærurna. Pengarnir fara í ein grunn til keyp av ljóðførum, sum eru ógvuliga serstøk.

Henda suzuki-frálæra byggir á eina uppfatan, sum ein maður við navninum Suzuki kom við. Hann helt, at børn kunnu læra alt, bara tey fáa tað inn frá lítlum, sum m.a. mál. Ljóðførini eru tí eisini serstøk, og heilt niður í 1/16 av vanligum. Men tað kostar at útvega.

Og 10-mannaførini fingu eitt ómetaliga vakurt steyp, sum tey skulu kappast um. Tann sum fyrst vinnur triggar ferður, fær Amerada Hess-steypið til ognar.

22 børn rýma

SNORRI BREND

Skúlastríðið í Kollafirði fær nú sínar fyrstu alvarsligu og ítøkiligu avleiðingar: Eftir summarfrítíðina verða ikki færri enn 22 næmingar tiknir út úr skulanum.

Hetta hendir, tí foreldur at hesum 22 næmingunum við skrivligum boðum hava meldað børn sín út úr skulanum. Talan er um børn í flest øllum flokkum, men serliga gongur tað út yvir 6. flokk, sum hevur verið nógv frammi í tjakinum.

Haraftrat skilst, at onnur foreldur í Kollafirði umhugsa at láta børn sín fara í aðrar skúlar, um ikki broyting kemur í viðurskiftini í skúlanum.

Arnbjørn Kristiansen skúlanevndarformaður váttar, at hesir 22 næmingarnir eru úrmeldaðir, og tí ikki koma í skúla eftir summarfrítíðina.

Annars hevur skúlanevndin í Kollafirði fund í kvøld, har hendu nýggja gongdin í skúlastríðnum verður eitt av málunum á skránni.

Í farnu viku sendi Foreldrafelkin eitt skriv út til allar borgarar í Kollafirði, har tey greiddu frá ymiskum viðurskiftum í Kollafjarðar skula.

Men nú frættist eisini, at onnur fólk í Kollafirði eru farin at savna inn »mótundirskriftir«, sum geva sín fulla stuðul til fyrstalæraran, Karin Hammer. Hvat orðaljóð er í hesum skrivi, er ikki greitt enn.

Lærararnir við Felagsskulan á Oyrarbakka gera viðmerkingar til málið inni í blaðnum í dag á síðu 9.

ICES: Veiðan eftir toski og upsa má skerjast við 30%

Altjóða Havrannsóknarstovnurin, ICES, er júst komin út við nýggjari frágreiðing um støðuna hjá ymisku fiskastovnunum undir Føroyum.

ELI GUTTESEN

Orsakað av teimum stóru broytingunum í bæði stovni og fiskiskapi seinastu árini er tað í løtuni ikki møguligt neyvt at siga, hvussu stór stovnsstøddin er, men stovnurin av toski á landgrunninum er mettur at vera omanfyri tað lívfrøðiliga minsta markið. 1992 árgangurin er sera góður og 1993 árgangurin væl omanfyri miðal. Veiðutrýstið er tó alt ov høgt og ikki burðardygt. Veiðutrýstið er vaksið nógv seinastu tvey árini og vil við núverandi veiðitrýstið verða ov høgt komandi árið. Mælt verður tí til at minka veiðitrýstið niður í eina helvt, so støði verður burðardygt.

Av tí at toskur verður fiskaður í blandaðum fiskiskapi saman við hýsu og upsa, so má tilmælið viðvíkjandi toski taka hædd fyri møguligum reguleringum av hinum fiskastovnunum eisini. Tí verður mælt til 30% niðurskurð eftir toski. Nógvar óvissur eru viðvíkjandi fiskidagaskipanini og mælt verður til at fylgja væl við hvussu leikur fer. Við øðrum orðum ber enn ikki til at leggja seg fastan á eitt ávíst dagatal ár undan ári, men at tilpassingar mugu gerast um neyðugt.

Tað ber ikki til neyvt at áseta stovnsstøddina á toskinum á Føroya banka, men hann er eftir øllum at dømi í vøkstri. Vegna óvissur í metingini verður mælt til, at royndin í 1998 ikki fer upp um verandi støði.

Hýsa og upsi undir Føroyum

Hýsustovnurin er omanfyri tað lívfrøðiliga lægsta markið og hildið verður, at hann fer at vaksa komandi tvey árini vegna tann sera góða 1993- árgangin. Veiðutrýstið er hóskandi og burðardygt og ICES mælir til, at veiðitrýstið verður hildið á hesum støðinum.

Tá hædd samstundis verður tikin fyri støðuni hjá toska- og upsastovninum, so metir ICES, at skilagott er at minka nakað um veiðistrýstið á hýsu; veiðan verður ikki mett at minka samsvarandi.

Upsastovnurin er mettur at vera uttan fyri lívfrøðiliga tryggar karmar bæði viðvíkjandi stovnsstødd og veiðitrýsti. Gytingarstovnurin er tað minsta, ICES veit um, eingir nýggir árgangir eru at hóma og veiðitrýstið er alt ov høgt. ICES mælir til at veiðutrýstið verður minkað niður á eitt burðardygt støði.

Tá hædd verður tikin fyri, at upsi verður fiskaður í einum blandaðum fiskiskapi saman við toski og hýsu, so mælir ICES til at royndin eftir upsa verður minkað 30%. Samstundis eigur fyribils ikki at verða loyvt at trýfalda dagatalið við at flyta á djúpari vatn at royna og gýtingarfriðingin av upsa eigur at verða uppaftur tikin.